Summar PRÁT



# EG GÓÐTAKI BARA LÍVIÐ SUM TAÐ ER

– SEINASTU MONGU **ÁRINI** HAVI EG HVØNN VETUR VERIÐ **SANNFØRDUR** UM, AT EG ERI LEYSUR AV **ÁRSTÍÐUM**, OG AT MYRKUR, VINDUR OG REGN TÍ **IKKI** ÁVIRKA MÍTT **LYNDI**, SIGUR **JÁKUP MAGNUSSEN**, ÚTVARPSMAÐUR, Í **SUMMARPRÁTINUM** HESAFERÐ. HANN **ELSKAR** MJØRKA, RÆÐIST IKKI **MYRKRIÐ** OG KENNIR LJÓSU TÍÐINA SUM EINA **GÁVU**, MEN GOTT ER AV OG Á AT SLEPPA AV **LANDINUM** AT VERA **ANONYMUR**, HELDUR HANN



**SAMRØÐA**
Uni Arge
uniarge@gmail.com

Rødd hansara hevur í nærum 30 ár verið at hoyrt í hvørjum útvarpslurti í landinum, og seinnu árini hevur hann í sínum sendingum hugleitt um tilveruna, samfelagið og innara friðin. Í hesi samrøðuni fara vit á uppdagingarferð í hugaheiminum hjá Jákupi Magnussen.

**Hvønn týdning hevur tann ljósa tíðin fyri teg?**
Vár og summar eru stuttligari, tí fólk verða meira opin, og nógv tiltøk verða sett í verk. Tað er eisini sera lívsjáttandi, at flytifuglurin kemur aftur, og at fólkalívið livnar sum heild. Lívsdygdin verður eisini størri, tí sólorkan ger meg betur føran fyri at vera til staðar í lívinum. Hon gevur mær hug at spæla og smílast meira, ja, eisini elska meira.

**Er ljósið ein fortreyt fyri, at vit eru eydnusom?**
Eg haldi ikki, at ljósa tíðin er ein beinleiðis fortreyt fyri, at vit eru eydnusom. Men av tí, at vit lata okkum stýra so nógv av veðrinum, tykist ljósa tíðin at vera fortreytin fyri góðum lag og trivnaði. Tað er vísindaliga prógvað, at menniskjanum tørvar ljós, og eg ivist ikki í, at so leingi fólk verða stýrd av ytri viðurskiftum, verður myrkur orsøk til tunglyndi og aðrar sinnisligar lívskreppur. Nógv kunnu vit tó gera fyri at bøta um okkara yo-yo lyndi. Eg havi í eitt áramál lært meg at góðtaka lívið, sum tað lagar seg. Hetta hevur bøtt um javnvágina í mínum lívi og eisini minkað um sinnisligu ávirkanina av veðrinum.

**Er tann ljósa tíðin betri enn tann myrka tíðin?**
Her má eg siga, at alt er líkaverdugt, og tí eru árstíðirnar bara, sum tær nú einaferð eru. Betri og verri er ein sinnislig meting, sum tekur annað fram um hitt. Tað kann samanberast við tað at gera mistøk. Mistøk havi lægri tign enn tað, sum eydnast, men uttan mistøkini høvdu vit ikki lært, hvussu vit kunnu fremja brøgd og megnaravrik. Alt hevur sín rætt.

**Er lyndið í føroyingum ávirkað av veðurlagnum?**
Føroyingurin letur seg stýra av myrkrinum. At síggja til húka vit nógv, og talumátin er mangan rættiliga jaja. Vit tosa altíð um regnið, hóast vit eru fødd inn í tað. Nú skal eg ikki generalisera ov nógv, tí føroyingar finnast, sum hava stórt yvirskot og seta nógv í verk, men nógv okkara vanta orku. Er landið kanska so lítið, at vit stjala orku frá hvørjum øðrum við ov nógvum eftirliti? Prógvið um, at veðurlagið ávirkar okkum, er várið. Tað tykist sum, at føroyingar snara 180 stig, tá sólin hækkar. Og vit verða samsvarandi vónbrotin, tá summarið ikki eftirlíkar veðurynskjum okkara.

**Ert tú nakrantíð bangin fyri myrkrinum?**
Nei, tað eri eg ikki. Haldi tað hinvegin vera spennandi. Minnir nakað um lívið, ið eg haldi vera mest spennandi, tá eg havi so fáar ætlanir sum gjørligt, tí tað letur upp fyri tí ókenda. Tá eg vaks upp, var onki internet ella aðrir margmiðlar. Vit høvdu plátuspælaran og útvarpið. Tí spældu vit næstan altíð úti, eisini tey myrku vetrarkvøldini. Veðrið var ikki avgerandi, tí vit lagaðu tey nógvu goymi- og leitispølini eftir tí. Eg haldi, hetta er ein orsøk til, at eg ikki ræðist myrkrið. Í dag dámar mær eisini væl náttina, tí tá reflekteri eg um lívið og spáki mínar túrar.

**Verður tú veðursjúkur av myrkri, vindi og regni?**
Ljósa tíðin kemur hvørt ár til mín sum bæði gáva og yvirraskilsi. Seinastu mongu árini havi eg hvønn vetur verið sannførdur um, at eg eri leysur av árstíðum, og at myrkur, vindur og regn tí ikki ávirka mítt lyndi. Hetta er nú ikki bara ynskihugsan, tí eg eri sannførdur um, at øll náttúrufyrbrigdi bara eru, sum tey eru, og at vit onki kunnu gera, sum kann broyta ein illfýsisdag til summardag. Kortini kann eg ikki hava alt upp á pláss í so máta, tí tá mars mánaði er hálvrunnin, kenni eg á mær, at eg lýsni og verði meira nærverandi.

**Hevur tú nakrantíð ætlað at flutt úr Føroyum orsakað av mjørka?**
Ja, fyrr gjørdi eg tað ofta. Í bakspeglinum síggi eg meg sjálvan sum rættiliga tunglyntan og negativan. Tað var helst orsøkin til, at eg fór at læra meg at vera ærligur um mín persón og fáa frið við meg sjálvan og onnur. Eg var stýrdur av egonum, sum ongantíð var í friði. Eg hevði ikki valdið í egnum lívi, og tí hevði eg eisini rættiliga døkkar periodur og var sannførdur um, at í øðrum londum gingu fólk á gullgøtum. Hetta kom serliga til sjóndar, tá veðrið leikaði í. Tá bannaði og blótaði eg mangan um hesar klettar og siteraði tvøramannin, Pól í Føroyum, sum segði, at Føroyar bara vóru nakrir klettar til flytifuglarnar at hvíla seg á. Eg royndi at búgva bæði í Norra og Danmark, men var ikki eydnuríkari har. Tað segði mær so, at veðrið er ikki tann týdningarmesti faktorurin í mínum trivnaði.

**Tolir tú mjørka?**
Eg bart út sagt elski mjørka. Haldi tað vera so hugnaligt at ganga í havnargøtum, tá tjúkkur mjørki liggur millum